betri trygging

# **Tilval** • Flutningur til viðgerðarstað

## Spurningar og svar

### Hvat fevnir flutningstilvalið um?

Við einum flutningstilvali fært tú endurgjald eftir galdandi tryggingartreytum fyri flogferð, tok, ferju, buss og koyri-pengar.

### Hvønn kann eg tekna flutningstilval fyri?

Tú kanst tekna flutningstilval fyri teg, hjúnafelagan/samlivan og/ella børnini, soleiðis at tit fáa ferðaútreiðslurnar aftur, tá ið tit fara til góðkenda viðgerð ella útgreining í Danmark (aftur og fram).

### Hvussu stórt ískoyti fái eg til gisting

Ískoytið til gisting kann vera upp til 1.000 kr. tilsamans – sama hvussu nógvar nætur tit gista. Máltíðir eru ikki við i endurgjaldinum.

### Fái eg sum foreldur endurgjald, um barnið skal viðgerast í Danmark?

Um minst eitt foreldur og viðkomandi barn hava teknað flutningstilval, dekka vit ferðina hjá tí foreldrinum, sum hevur flutningstrygging - og skadda barninum

Um so er, at barnið er ókeypis samtryggjað, tí bæði foreldrini eru dekkað av eini viðgerðartrygging hjá Gjensidige, skal barnið kortini teknast til flutningstilvalið, um tit ynskja flutningstryggingina til barnið.

Ferðast tú saman við einum barni, sum er góðkent til viðgerð í Danmark, dekka vit upp til 1.000 kr. til gisting íalt. Barnið verður roknað sum barn til tað er 24 ár. Eftir tað verða øll roknað sum vaksin.

### Verður ein møguligur fylgjari umfataður?

Tryggingin dekkar bara flutning av tí skadda - uttan so, at talan er um børn – sí undanfarna spurning og svar.

### Er flutningur frá hotelli til sjúkrahús dekkaður?

Ja, flutningurin frá hotellinum til sjúkrahúsið er umfataður av flutningstilvalinum. Hevur tú til dømis tørv á einum taxa frá hotellinum til sjúkrahúsið, so endurrinda vit túrin aftur og fram.

### Í hvørjum prísklassa skulu flogferðirnar vera, um eg skal fáa endurgjald?

Vit dekka bara lágprísferðaseðlar.

### Hvørjir dekningar eru galdandi, um eg koyri í egnum bili?

Tá rinda vit endurgjald sambært donskum koyritaksti. Tað vil siga, at fyrstu 25 kilometrarnir hvønn vegin rindar tú úr egnum lumma, og so tekur flutningstilvalið við. Brúgvargjald verður tó ikki endurgoldið.

### Hevur tú spurningar?

Hevur tú spurningar, antin um flutningstilvalið ella tínar møguleikar við viðgerðartryggingini, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við Gjensidige á tel. +45 7010 9009.